# Norðstreymoyar Javnaðarfelag

## Ársaðalfundur

Ársaðalfundur verður í Bjargingarfelagshúsinum í Kollafirði mikudagin tann 30. mai kl. 20.00.

Skrá:
1) Formansfrágreiðing
2) Rokniskapur fyri ár 2000
3) Val av nevnd
4) Val av grannskoðara
5) Umboðsval til flokslei ðsluna
6) Innkomin uppskot
7) Ymiskt

Aftaná verður tjak har løgtingsumboð luttaka.

**Nevndin**

---

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

**Nýggj útbúgving**

**FRAMLEIÐSLUTØKNINGUR**
Akademiútbúgving

**Útbúgvingin tekur 2 ár og fevnir m. a. um**
> kunningartøkni
> maskinkonstruktión
> framleiðslutøkni
> framleiðslustýring
> virkisleiðslu

**Upptøkukrøv**
> handverkaraútbúgving í viðkomandi yrki
> studentsútbúgving
> atstøði
> H H
> H T
> H F

**Útbúgvingin byrjar í august 2001.**
Nærri upplýsingar um útbúgvingina og umsóknarbløð fáast við at venda sær til lestrarvegleiðing skúlans, mána-, miku-, og fríggjadag kl. 10.00 – 11.30.

**TEKNISKI SKÚLIN TÓRSHAVN**
Marknagilsvegur 75 · Postsmoga 239 · FO – 110 Tórshavn
Telefon + 298-31 19 57 · Telefaks + 298-31 66 21
tst@tst.fo · www.tst.fo

---

**Uppsetan og skipan av barrum**

Til:
Brúdleyp
Rundar føðingardagar
Starvsfólkaveitslur
Ársveitslur
Reseptiónir
og tilíkt



Hans á Lag Sp/f
Tlf. 21 93 83
hanslag@post.olivant.fo

Sosialurin 311820

---

**Blái Krossur Føroya søkir**

# Fyristøðufólk til Blákrossheimið

Av tí at fyristøðufólk okkara á Blákrossheiminum fer úr starvi 15. juli 2001, søkja vit eftir nýggjum fyristøðufólki at byrja 1. juli 2001 ella so skjótt sum til ber.

**Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:**
- Dagligu leiðsluna av Blákrossheiminum, herundir eisini tí fíggjarliga
- At tryggja búfólkunum góð og livilig kor
- At menna starvsfólkini
- At samstarva við stýrið fyri heimið og annað virksemi í Bláa Krossi
- At samstarva við aðrar stovnar og almennar myndugleikar

**Førleikakrøv:**
- Hóskandi fakliga útbúgving og leiðsluroyndir
- Kunnleika til málbólkin
- Góð samstarvsevni og hegni at skipa fyri og leiða arbeiði
- Góð evni at býta út uppgávur og at stimbra starvsfólkunum
- Kann, í samstarvi við starvfólkini, menna heimið fakliga
- Góð evni at lurta
- Tekur undir við tí sum Blái Krossur stendur fyri, hugsjónarliga og andaliga

**Vit bjóða:**
- Eitt spennandi og gevandi arbeiðsumhvørvi og ágrýtin starvsfólk
- Persónliga menning gjøgnum skeiðluttøku
- Samband og samstarv við onnur starvsfólk í landsfelagsskapinum
- Eitt leiðarastarv lønt sambært avtalu millum Blákrossheimið og Fíggjarmálastýrð

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Bláa Krossi Føroya í hendi í seinasta lagi 18. juni 2001.

Umsóknir skulu sendast til:
**Bláa Kross Føroya**
att. Ásbjørn Jacobsen, aðalskrivari
Glyvravegur, 625-Glyvrar.

Fleiri upplýsingar fáast við at ringja til skrivstovuna hjá Bláa Krossi tlf. 449343 og tosa við Ásbjørn Jacobsen, aðalskrivara.

Blákrossheimið, ið er eitt viðgerðarheim fyri rúsevnismisnýtarar, er stovnsett av Bláa Krossi Føroya við góðkenning frá Føroya Landsstýri. Á heiminum eru 11,5 starvsfólk. Pláss er fyri 15 búfólkum. Eisini eru búfelagsskapir og eftirviðgerð knýtt at heiminum. Blákrossheimið verður fíggjað við árligari játtan frá landsstýrinum.

Blái Krossur Føroya er ein kristiligur fráhaldsog hjálparfelagsskapur, sum hevur til endamáls at hjálpa menniskjum, ið eru illa stødd av rúsdrekkaávum, at fyribyrgja misnýtslu av rúsdrekka og øðrum rúsandi evnum, at virka fyri eini rúsfríari lívsáskoðan og rúsfríum umhvørvi, at boða gleðiboðskapin um Guds kærleika til menniskju.

**Blái Krossur Føroya**
Glyvravegur, 625 Glyvrar
tlf. 449343, fax: 449353
t-postur: blakross@blakross.fo
www.blakross.fo

---

# Hús í Hoyvík til sølu



Um hóskandi boð fæst, verður ognin matr. nr. 36, Hoyvík, ið liggur Garðavegur 22, 188 Hoyvík seld. Á ognini eru sethús bygd 1948-49. Húsini eru í 2 hæddum við lágari reising.

Grundøkið er 2025 m2.

Áhugað verða biðin um at venda sær til

**Advokatfelagið**
Yviri við Strond 4
100 Tórshavn
tlf. 311260

---

# Blái Krossur Føroya

Útsetti aðalfundurin verður á Runavíkar Sjómansheiminum týskvøldið 20.05.2001 kl. 19.30. Skrá sambært viðtøkum felagsins.

**Landsnevndin**

---

# Kappríðing



Tilmelding til kappríðingina á Leynavatnsstevnuni, sum verður leygardagin 2. juni 2001, er á tlf. 315242, 421643 ella 328029 til týskvøldið 29. mai kl. 20.00.

Felagstúrur verður norður til Leynavatn. Farið verður úr Havnardali fríggjakvøldið kl. 20.00.

**Føroya Ríðingarfelag**






---

# Ert tú leiðarin, vit leita eftir ?

Søkt verður eftir deildarleiðarum til deildir okkara í Vestmanna og Fuglafirði

Deildirnar hava sum høvuðsendamál at taka sær av dagliga kundaviðskiftinum á økinum.

**Uppgávur:**
- daglig leiðsla og skipan av arbeiði á deildini
- skapa eitt mennandi og avbjóðandi arbeiðspláss
- tryggja at ráðgevingin og tænastan eru á høgum støði
- útinnan av kredittmetingum
- uppfylging av deildarroknskapi og fíggjarætlan
- umframt aðrar uppgávur álagdar av stjórnini

**Førleikakrøv:**
- Peningastovnsútbúgving við "Finansiel Videreuddannelse" ella HA, HD, Bachelor ella aðra viðkomandi útbúgving
- góðan kunnleika til EDV
- duga at málbera seg í skrivt og talu

Umsøkjarar, ið hava peningastovnsroyndir og/ella leiðararoyndir hava fyrimun.

**Persónligir eginleikar:**
- duga at arbeiða sjálvstøðugt og tora at taka avgerðir
- hava góð evni at umstilla seg í einum broytiligum umhvørvi
- hava góð samstarvsevni og evni at leiða ein bólk í einum kravmiklum umhvørvi

Umsøkjarin skal vera sinnaður at menna seg fakliga og persónliga.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Steinbjørn Hardlei, starvsfólkaleiðara, tel. 348000.

Løn og eftirløn verða ásett eftir nærri avtalu.

Umsókn, saman við viðkomandi skjølum, skal verða Føroya Sparikassa í hendi í seinasta lagi 11. juni 2001, og sendast til:

Føroya Sparikassi
att.: Starvsfólkaleiðarin
Postsmoga 34
110 Tórshavn

FØROYA SPARIKASSI
Starvsfólkadeildin, Yviri við Strond 2, FO-100 Tórshavn
E-post: Starvsfólkadeildin@sparikassin.fo www.sparikassin.fo

Føroya Sparikassi hevur 21 deildir kring landið, ið serliga fáast við at veita ráðgeving, fígging og selja tænastur Sparikassans.

---

# Keyp myndir

Nú er møguleiki at keypa myndir sum standa í Sosialinum





Kostnaður pr. stk. fyri litmynd:

| | |
|---|---|
| 10x15 cm. kr. 80,- | 18x24 cm. kr. 150,- |
| 13x18 cm. kr. 100,- | 20x30 cm. kr. 200,- |
| 15x21 cm. kr. 130,- | 30x45 cm. kr. 350,- |

Fyll henda lepan út.
Klipp myndina út og send hana saman við lepanum til Sosialin.

Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Blað nr.: ____________
Síða: ____________
Stødd: ____________
Mongd: ____________

Navn: ____________
Bústaður: ____________
____________
Telefon: ____________

---

Original
bosal
Útstoyt



ES
p/f Esmar Simonsen
Kambsdalur
FR-530 Fuglafjørður
Tlf. 444405
Fax444629

---

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

---

# Bátur til sølu

Ein Hvalvík 800 fisherman 27 føt, til sølu.

**Tlf. 250113**

---

# Astmadagur á Torginum í SMS

Hósdagin 31. mai kl. 10.00-17.30 skipar Tjalduts Apotek fyri ymiskum tiltøkum í samband við astma.

- Peakflow máting
- Koliltumáting
- Nýtslu av astmatilbúningum o.ø.

Av tí at dagurin eisini er Altjóða Tubbaksfríur dagur, fer apotekið at selja »Legg av pakkar« til roykjarar fyri 25 kr.

**Tjaldurs Apotek**